# Frávik í streymútrokningunum

*Menn hava gjørt vart við, at streymtalvurnar, sum standa í bløðunum, ikki altíð samsvara. Teir, sum rokna streymin út, eru vitandi um frávikini*


*So harður er streymur í Føroya firði* *Mynd: Edvard Joensen*

EDVARD JOENSEN

Streymtalvurnar, sum standa í Sosialinum, Dimmu, Skipalistanum og Álmanakkanum, samsvara ikki altíð. Hetta hava menn gjørt vart við. Men talan hevur bert verið um vanlig menniskjanslig mistøk, sum altíð kunnu koma fyri, sigur Ólavur á Heygum, sjómansskúlalærari, ið ger streymtalvurnar, sum standa í Sosialinum.

Herfyri varð gjørt vart við, at talvan, sum stóð í einum av bløðunum, samsvaraði ikki við tað, sum í øðrum blaði stóð. Talan var um ein hendiligan roknifeil, har tann, sum hevði gjørt aðra talvuna, hevði lagt fingurin á skeivan dag, tá hann roknaði út frá mánastøðuni.

Hinvegin hava menn gjørt vart við, at tað er ikki samsvar millum Álmanakkan og Skipalistan. Eisini hetta hava teir kannað, sigur Ólavur á Heygum. Hann sigur, at útrokningin í nýggja, føroyska skipalistanum er røtt. Munurin kann vera millum 20 minuttir og ein tíma.

Ólavur á Heygum sigur, at tað, sum stendur í talvunum, eru bara vegleiðandi tíðir, sum roknaðar eru út frá mánastøðuni og hava strangt tikið bara gildi á víðum havi og har, eingin botnur er. Allir menn, sum flóta, eiga at vita, at tað er neyðugt at brúka vit og skil, tá farið verður á flot. Tað hevur ongantíð borið til, og fer heldur ongantíð at bera til at fara á flot eftir tabel. Tíðirnar, sum tanda í streymtalvunum eru roknaðar eftir mánastøðuni og eru beinleiðis teori. Tær passa í grundini bara á víðum havi og har, sum djúpt er, tekur Ólavur á Heygum, sjómansskúlalærari, uppaftur.

Allir skilamenn vita, at tað eru so ótrúliga nógvir aðrir faktorar, sum spæla inn og ávirka streymin. Afturundirgerðirnar eru nógvar. Streingir kunnu flyta seg eftir veðurlíkindum. Nes og grynnur kunnu fáa streymin at uppføra seg øðrvísi, enn talvan sigur. Og so framvegis.

Eisini liggja vit mitt í Golfstreyminum. Og her vísir Ólavur á Heygum, sjómansskúlalærari, á, at í heilt spøkum ráki kann tað henda, at Golfstreymurin vinnur á sjóvarfallinum, so tað rekur beint øvugt av tí, sum streymtalvan annars sigur, at tað átti at gjørt.

Ólavur á Heygum sjómansskúlalærari, ger, sum sagt, talvurnar, sum standa í Sosialinum, meðan ein starvsfelagi hansara ger tær hjá Dimmalætting. Ólavur á Heygum sigur, at teir skeita í hvør hjá øðrum og kanna eftir, um rætt er. Og báðir nýta sama útrokningarhátt. Nevniliga tann, sum teir læra næmingarnar á Føroya Sjómansskúla. Og tað skuldi helst verið rætt, sigur Ólavur á Heygum.

Annars sigur hann, at teir vilja fegnir hoyra frá fólki, sum veit eitthvørt at siga um streym. Lokal frávik. Onkrar íður ella afturundirgerðir, sum bera seg óregluliga at. Ella um onkur feilur er í talvunum, sum gjørdar verða.

Sjálvur hevur hann heitt á útróðrarmenn og menn, sum sigla við eitt nú strandfaraskipum, um at siga sær frá, hvussu streymurin ber seg at á teimum ymsu støðunum. Og teir taka fegnir í móti upplýsingum av øllum sløgum, sum hava við streym og streymviðurskifti at gera, sigur hann.

Ólavur á Heygum undirvísir á Føroya Sjómansskúla, og har ber altíð at ringja. Telefonnummarið er 31 17 49.




*Bogi Mortensen í Vági er formaður í nýggja arbeiðsbólkinum*

# Arbeiðsbólkur settur til økismenningarpolitikk


*Bogi Mortensen*

Í sambandi við fíggjarlógarsamtyktina í Løgtinginum hevur landstýrismaðurin í undirvísingar- og mentamálum í dag sett arbeiðsbólk at veita grundarlag undir einum økismenningarpolitikki fyri alt landið. Í mun til arbeiðið hjá útoyggjanevndini verður her talan um, hvussu økini í landinum kunnu mennast í síni heild, og hvussu javnvág kann skapast millum miðstaðarøkini og hini økini.

Arbeiðssetningur arbeiðsbólksins er m.a.:

- At viðgera støðuna og framtíðarútlitini fyri tey ymsu økini í landinum
- At samanbera og lýsa fortreytirnar fyir at økini eru í framgongd ella afturgongd - vinnuliga, við fólkasamanseting, við mentanararbeiði o.ø.
- At gera ítøkilig tilmæli til ein økismenningarpolitikk.

Í arbeiðsbólkinum eru hesi: Bogi Mortensen, Vágur, formaður, Thurid Olsen, Sandavágur, Dennis Holm, Vágur, Annvør Jacobsen, Eiði, Hans Pauli Strøm, Vestmanna, Olga Biskopstø, Klaksvík og Karl Vidtfeldt, Sandur.

Vísandi til at Útoyggjanevndin ið er sett fyri at menna útoyggjarnar, og arbeiðsbólkurin viðv. økismenningarpolitikki koma at arbeiða við ávísum viðurskiftum, ið eru eins fyir báðar arbeiðsbólkarnar, er Olga Biskopstø, samskipari Útoyggjanevndin, eisini limur í hesum arbeiðsbólki.

Álitið verður at handa landsstýrismanninum í undirvísingar- og mentamálum í seinasta lagi mánadagin tann 2. oktober 2000. Ætlanin er, at álitið skal leggjast fyri Løgtingið til orðaskiftis í heyst.




*Næmingar úr Hoydølum vunnu føroysku EBG-kappingina í ár. Frá vinstru: Joan Stampe, Føroya Banki, stýringarbólkurin, Bjørgfríð Ludvig, Føroya Arbeiðsgevarafelag, stýringarbólkurin, Hans Pauli J. Hentze, Foshell, Claus Reistrup, Undirvísingar- og mentamálstýrið, stýringarbólkurin, Oliva Sólvá Danielsen, Foshell, Jóannes í Hoygarðinum Niclasen, Foshell*

# Næmingar úr Hoydølum vunnu

*Ein bólkur við næmingum úr Studentaskúlanum og HF-skeiðinum í Hoydølum vunnu innleiðandi kappingina í European Business Game. Finalan verður í Føroyum*

Vinnari av EBG-kappingini í ár var "FOSHELL" — bólkur mannaður við 4 næmingum úr Studetaskúlanum og HF-skeiðnum úr Hoydølum. Tey eru Jóannis í Hoygarðinum, Olivia Danielsen, Una Jacobsen og Hans P. Hentze. Lærari: Holger Arnbjerg, lektari í vinnubúskapi.

EBG er ein evropeisk kapping millum næmingar á ungdómsútbúgvingunum. Í kappingini skulu teir grundleggja — alt uppspunnið — eina fyritøku. Teir skulu finna eitt hugskot, gera avtalur um rávøru, framleiðslu og sølu. Næmingarnir skulu gjøgnum alla virkisgongdina og syrgja fyri, at fyritøkan verður góðkend hjá almennu mynduleikunum. Ein realistiskur roknskapur yvir eitt 3-ára skeið skal leggjast fram og góðkennast av lánistovni osfr.

Hetta er 4. árið skipað er fyri EBG og tvær ferðir áður hevur Fiskivinnuskúlin í Vestmanna vunnið — fyrstu ferð her í Føroyum og seinru ferð á teirri endaligu evropeisku finaluni. Tvær ferðir hevur ein bólkur frá Føroya Studentaskúla og HF-skeiði í Hoydølum vunnið føroysku finaluna, í 1998 og í ár. Finalan í ár verður í Norðurlandahúsinum leygardagin 8. Juli 2000.

### Góð skoðsmál

Í stuttum kann sigast, at verkætlanin hjá vinnandi bólkinum "FOSHELL", snýr seg um at framleiða **kitoson**, sum verður nýtt sum reinsi- og avmakringskurur og **astaxantin**, sum er eitt litevni frá rækju- og fiskaburturkasti frá føroysku fiskivinnuni til nýtslu, innan bioteknologisku vinnuna.

Føroyska dómsnevndin var væl nøgd, og gav m.a. hesi ummælini:

Arne Poulsen, Vinnumálastýrið:

– Ætlanin er í tráð við vinnupolitikk landsins, sum er at diversifisera vinnuna, men harumframt at leggja dent á KT — og bioteknologiska vinnu. Roknað verður við at hesar báðar vinnur passa væl til umstøðurnar i Føroyum og vinnugrundarlagið í Føroyum, og at tær kunnu skapa stórt avkast. Verkætlanin hevur rakt rætt í so máta, um man í heila tikið kann siga so.

Martin Jacobsen, stjóri:

– Eg haldi at hettar er ein góð uppgáva. Hugskotið er nýskapandi og vinna av hesum slagi er vanliga profitgevandi. Stigatal av 100 : 87

Klaus Rasmussen, statsautoriseraður revisor:

– Jeg synes, at opgaven tydelig bærer præg af, at der er lavet et stort arbejde.

# Herverk í viðalundini

*Tað er ikki altíð heilt trygt hjá viðalundini í Havn at standa úti um náttina*

EDVARD JOENSEN

Summum fólkum dámar eftir øllum at døma væl at gera seg inn á deyð ting og slíkt, sum ikki fær svarað aftur. Viðalundin í Havn leggur javnan øki til slíkan ágang. Serliga er tað hesa ljósu tíðina, fólk gera um seg, sigur skógfútin.

Um vikuskiftið hevur onkur verið og gjørt seg inn á beinkirnar í viðalundini í Havn. Teir vóru allir samlir tveittir í ánna.

Tróndur Leivsson, skógfúti, sigur, at beinkirnir vóru tiknir upp aftur og settir á pláss beinanvegin mánamorgunin. Men tað er sera óheppi og irriterandi, at viðalundin ikki fær frið. Tí hon er júst eitt frístað hjá bæði fólki og kríatúrum.

Hetta, sum hendi um vikuskiftið, er einki eindømi, sigur skógfútin.

-Tað síggja vit ofta, serliga hesa ljósu tíðina, tá veðrið er gott. Onkuntíð hevur tað verið verri, en tað var hesaferð. Men tað er líka sárt hvørja ferð fyri tað, sigur hann.

Tróndur Leivsson, skógfúti, harmast serliga um fuglin, sum júst nú er serliga viðbrekin, nú tað hevur verið so turt. Til dømis eru dunnurnar við at koma við ungum, og tær hava at kalla ongastaðni at fara, tí áin er so at siga turr. Og sama skilið er við tjarnunum. Tí ávirkast tær serliga nógv av slíkum gangi, sum verður hildin, tá blakað verður runt við tingunum, ið eiga at standa í friði í viðalundini.

Eitt annað hjartasuff hevur skógfútin eisini. Tað er ein áheitan á foreldur um at ansa eftir og fylgja við, hvar børn teirra spæla og við hvørjum spælt verður.

Tað sæst alt ov ofta, at børn hava verið í viðalundini við bæði sag og øks umframt knívi og høgt og skorið í trøð og runnar. Tað ger óbótaligan skaða, sigur Tróndur Leivsson, skógfúti.

